

## 80 børn sungu í jólabýi

Børn í Frítíðarskúlanum við Løgmannabreyt vitjaðu jólabýin í miðbýnum í Havn fyrradagin. Hóast tað regnaði, var fitt av fólki savnað at hoyra tey á leið 80 hoyvíksbørnini syngja jólasangir. Millum smátturnar er lívd og úr tí einu smáttuni, ið selur vaflur, er so góður angi. Tí er tað javnan, at børn úr skúlum og frítíðarskúlum í kommununi vitja jólabýin. Meiri kann lesast um jólabýin á torshavn.fo.

# Navigatørar úr fiskiflota í frálandavinnu

**Talið av navigatørum í fiskiflotanum minkar. Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur staðfest, at fleiri navigatørar eru farnir úr fiskiflotanum og yvir í frálanda-og farmaskipavinnu**

NAVIGATØRAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sjálvt um nøkur fiskiskip eru farin á húsagang, og onnur eru løgd, tí raksturin ikki fekst at hanga saman við høgum oljuprísum, er ikki líkt til, at nógvir navigatørar ganga hond í lumma.

Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag (FSN), sigur, at tølini yvir limagjøld hjá limum hansara í ár eru minni enn árið fyri, men tey als ikki minkaði so nógv, sum inntøkurnar hjá fiskiflotanum eru minkaðar.

- Limatalið hjá okkum er lítið broytt, men vit hava eina minking í limagjøldum í ár upp á eini 5%, samstundis sum sagt verður, at inntøkurnar hjá fiskiflotanum sum heild eru minkaðar eini 20%, sigur hann.

### Fleiri uttanlands

FSN hevur eisini staðfest, at meðan inntøkurnar frá limagjøldum í fiskiflotanum minka, eru limagjøldini frá limum, sum sigla undir føroyskum flaggi í frálanda-og farmaskipavinnu veksandi.

– Tað, at vit ikki hava merkt nakað serligt til, at navigatørar eru arbeiðsleysir, samstundis sum inntøkurnar úr uttanlandssigling veksa, merkir, at navigatørar eru rímiliga mobilir – eisini í tíðum sum hesum, nú tað sansar at í einum parti av flotanum.

Eyðstein sigur, at FSN bert fær limagjald frá navigatørum, sum sigla undir føroyskum flaggi – og ikki teimum, sum eru búsitandi í Føroyum, men sigla undir fremmandum flaggi.

- Líkt er tí ikki til, at navigatørar, sum gerast arbeiðsleysir, steðga leingi á. Hesir eins og onnur hava brúk fyri at hava eina fasta inntøku, og tíðin at bíða eftir skipinum, sum er farið undir hamaran, kann gerast ov long – og óviss. Tí leita teir sær hýru í frálanda-og farmaskipavinnuni, sigur hann.

### Vil hjálpa

Fleiri av navigatørunum, sum fara av landinum og í onnur lond at sigla undir fremmandum flaggi, hava áður verið limir í Føroya Skipara-og Navigatørfelag. Men tá hesir ikki sigla undir føroyskum flaggi longur, er tað heldur ikki FSN, sum hevur sáttmála fyri teir.

- Vit mæla teimum tá til at gerast limir í felag í landinum, har skipini hoyra heima.

Eyðstein sigur, at tað eru eisini fólk, sum soleiðis sigla undir hentleikaflaggi, og tá kunnu umstøðurnar í onkrum føri vera ivingarsamar.

- Vit ætla okkum undir eitt átak, har vit fara at bjóða okkum at umboða navigatørar, sum sigla undir fremmandum flaggi og hava bústað í Føroyum, sigur hann.

### 600 limir

Føroya Skipara-og Navigatørfelag hevur umleið 600 virknar limir og umleið sama tal av hvílandi limum.

- Hvílandi limir eru ofta fólk, sum hava verið aktivir limir hjá okkum, men sum eru farnir aðrar vegir at sigla ella í onnur størv. Hetta kunnu eisini vera pensjóneraðir limir, sigur Eyðstein Djurhuus.

Nakrir fáir limir hjá FSN eru ikki-siglandi fólk. Hetta eru eitt nú havnameistarar, sum eru einir 12 í tali.

Havnameistarar kunnu nevniliga velja, um teir vilja vera limir í Starvsmannafelagum ella í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.



*Inntøkurnar hjá fiskiflotanum eru minkaðar munandi meira enn inntøkurnar frá limagjaldi hjá eitt nú navigatørum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# – Vit mugu taka tað sum tað kemur

**Ein stórur partur av heimaflotanum er í trupulleikum, men lækkaðu oljuprísirnir fara vónandi at bøta um vánaligu gongdina. FSN sær møguleikar við broyttu FAS-skipanini, sum vónandi fer at geva nakað av sær**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Vit síggja stórar møguleikar í broyttu FAS-skipanini, sigur formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag*

Tvey av manningarfeløgunum, sum halda sínar regluligu aðalfundir og landsfundir millum jóla og nýggjárs, eru Føroya Fiskimannafelag og Føroya Skipara-og Navigatørfelag (FSN). Felagið hjá føroyskum fiskimonnum uttanlands plagar eisini at halda sín aðalfund millum høgtíðirnar.

Eyðstein Djurhuus, formaður í FSN, sigur, at hann fer at leggja fram eina gjøgnumgongd av tí, sum felagið hevur fingist við í hesum árinum.

- Eg fari í fyrsta lagi at røða um mál, sum eru fevnd av okkara sáttmálaøki.

FSN hevði eisini sín leiklut í málinum um stóra verksmiðjutrolaran Topas, og hetta mál tekur formaðurin eisini upp í síni ársfrágreiðing.

- Eitt annað og áhugavert mál er broytta FAS-skipanin, sum vónandi fer at geva føroyskum navigatørum og sjófólki annars fleiri møguleikar við fleiri frálanda-og farmaskipum undir føroyskum flaggi.

Eyðstein Djurhuus sigur, at felagið hevur stórar vónir um broyttu FAS-skipanina.

- Tað, sum er broytt í skipanini, er, at reiðaríini fara at fáa eina enn størri afturbering, sum nú verður 35%. Haraftrat kemur tann broyting í gildi 1. januar, at inntøkur undir FAS-skipanini nú skulu gjalda 35% í skatti í staðin fyri, at hesar inntøkur hava fingið sjómansfrádrátt og síðan vanligan skatt av restini, sigur hann.

### Útlit frameftir

Formaðurin í FSN heldur tað vera torført at meta um útlitini hjá hansara limum fyri komandi ár.

- Ein stórur partur av heimaflotanum er í trupulleikum, men lækkaðu oljuprísirnir fara vónandi at bøta um vánaligu gongdina.

Hinvegin sær Eyðstein Djurhuus møguleikar við broyttu FAS-skipanini, sum hann vónar fer at geva nakað av sær.

- Tað er altíð ilt at spáa um tað, sum liggur fyri framman, men vit noyðast at taka tað, sum tað kemur – og vónandi fer árið at laga seg hampiligt, sigur formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag.